## Agger sleppur at spæla



Danski verjuspælarin, Daniel Agger, hevur ikki spælt nógv fyri Liverpool síðstu mánaðirnar, og nógv hevur verið tosað um, at Agger kanska skal skifta felag. Venjarin hjá Liverpool rør tó framundir, at Agger fer at fáa spælitíð. – Agger veit, hvat eg haldi um hann. Um hann sleppur undan skaðum, so kann hann verða tikin fram um teir, sum hava spælt síðstu tíðina, sigur Rafael Benitez við Mail On Sunday.

## Iran koyrt venjaran

Ali Daei er toppskjútti á iranska fótbóltslandsliðnum og ein fótbóltshejta uttan líka, men tað hevur ikki gingið líka væl sum venjari hjá landsliðnum. Ali Daei hevur júst fingið sekkin sum landsliðsvenjari, eftir at Iran tapti 2-1 fyri Saudiarabia í einum HM-undankappingardysti um vikuskiftið. Iran hevur bert fingið seks stig í fimm dystum, og tað hevur nú kostað Daei starvið.



*Áskoðararnir troðkaðust rundan um borðini í fimleikarhøllini í Klaksvík, tá tað gjørdist neyðugt við umdysti, áðrenn greitt var, at Havnar Telvingarfelag endaði framman fyri Sandavágs Talvfelag*

*Mynd: Janet Matras Toftum*

# Havnin tók Sandavág á sjálvari málstrikuni

**Sandavágs Talvfelag var undan seinasta umfarinum í liðkappingini hálvtfjórða stig framman fyri Havnar Telvingarfelag. Men í seinasta dystinum teirra millum vunnu havnarmenn 3½-½ og fingu umdyst í kvik-talvi, sum teir vunnu sannførandi 4-0**

TALV
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Longu nakrar dagar undan seinasta umfarinum í liðkappingini í talvi gjørdi kappingarleiðarin vart við, hvussu framferðarhátturin var, um tað skuldi blivið neyðugt við umdysti millum tvey lið. Og í sambandi við endaspurtin í 1. deild, so var bara tann eini matematiski møguleikin, ið gav umdyst.

Og hóast mong mundu halda, at møguleikin fyri hesum var rættiliga lítil, so lagaði tað seg soleiðis, at júst ein umdystur millum Sandavágs Talvfelag og Havnar Telvingarfelag kom at avgera kappingina um føroyameistaraheitið hesa ferð.

Undan seinasta umfarinum hevði Sandavágur 23 stig og Havnar Telvingarfelag 20 stig, meðan Klaksvíka Talvfelag lá og lúrdi aftanfyri við 19½ stigi. Endaði tað við 3½-½ sigri til Havnina á Sandavági, høvdu bæði liðini 23½ stig – og tað var eisini júst tað, sum hendi!

Hevði besta liðið hjá klaksvíkingar samstundis vunnið 4-0 á Vestmanna, so hevði umdysturin bert verið galdandi fyri silvurið, tí so hevði Klaksvík vunnið meistaraheitið við 24 stigum. Men Klaksvík vann 2½-1½ á Vestmanna, so við 23 stigum máttu klaksvíkingar taka til takkar við bronsuni.

### Brúktu fyrimunin

Í gulldystinum var Havnin var leingi á sigurskós, og nokk so tíðliga vann Helgi Dam Ziska á øðrum borði á Torkili Nielsen. Herluf Hansen var næstur, tá hann basti Jónfinni Thomsen, og síðani vann Bogi Ziska á Bernhardi Augustinussen. Sostatt var Havnin á odda 3-0.

Nú vóru øll eygu vend ímóti fyrsta borði, har Martin Poulsen úr Havnar Telvingarfelag hevði fyrimun ímóti Olafi Berg, sum telvar fyri Sandavágs Talvfelag. Men ikki eydnaðist Martini at fáa fult burtur úr fyrimuninum, so her endaði tað við remis – og tá stóð greitt, at umdystur skuldi til.

Reglurnar fyriskrivaðu, at fyrst skuldi telvast ein dystur við kviktalvi, har hvør telvari hevði eitt korter til sínar leikir. Stóð framvegis á jøvnum, skuldi telvast við snartalvi, líka til annað liðið hevði vunnið. Snartalvið kom tó ongantíð upp á tal, tí til tað vóru havnarmenninir ov sterkir og sannførandi.

Martin Poulsen, Helgi Dam Ziska, Bogi Ziska og Herluf Hansen brúktu til fulnar sálarliga fyrimunin av at hava vunnið dystin frammanundan, og teir vunnu allir á sandavágsmonnum, so umdysturin endaði við einum greiðum 4-0 sigri til Havnar Telvingarfelag, sum sostatt gjørdist føroyameistari.

### Rukku ikki á mál

Meira spennandi kundi endin á liðkappingini ikki blivið, men tað munnu sandavágsmenn leggja lítið í, tí óivað er tað teimum eitt stórt vónbrot, at teir vóru so nær – og tó ikki rukku á mál. Høvdu teir bara fingið tvey remis, hevði tað verið nóg mikið, tí eitt stig í dystinum hevði tryggjað teimum meistaraheitið, sum enn ikki hevur verið í Sandavági.

Besta úrslitið í 41 ára gomlu søguni hjá Sandavágs Talvfelag higartil er bronsa í fjør, men nú er tað so betra við silvuri. Um tey í Sandavági duga at gera sær dælt av hugtakinum »alle gode gange tre«, verður tað kanska í næsta ár, at tað eydnast at koma heilt upp á tindin!

Steypið, ið føroyameistararnir í Havnar Telvingarfelag nú fáa í varðveitslu, er Postverkssteypið, ið fyrstu ferð var latið í 2004. Klaksvíkingar vóru meistarar í 2004 og 2007, og vestmenningar í 2006 og 2008. Havnarmenn, sum vunnu í 2005, hava nú aftur fingið fingrarnar í steypið, sum næsta árið sleppur at standa til prýðis í hølum felagsins í R. C. Effersøesgøtu í Havn.

## Talvstøðurnar

**1. deild**

| | |
|---|---|
| 1. Havnin 1 | 23½ stig |
| 2. Sandavágur | 23½ stig |
| 3. Klaksvík 1 | 23 stig |
| 4. Vestmanna | 20½stig |
| 5. Klaksvík 2 | 16 stig |
| 6. Havnin 2 | 12½ stig |

**2. deild**

| | |
|---|---|
| 1. Toftir | 28½ stig |
| 2. Rókur | 24½ stig |
| 3. Sandavágur | 24 stig |
| 4. Vestmanna | 23½ stig |
| 5. Klaksvík | 19½ stig |

**3. deild**

1. Havnin
2. Vestmanna
3. Gøta
3. Havnin
5. Rókur
6. Sandavágur
7. Skopun
8. Klaksvík

**Unglingar**

| | |
|---|---|
| 1. Klaksvík | 22½ stig |
| 2. Havnin | 21½ stig |
| 3. Sandavágur | 14½ stig |
| 4. Vestmanna | 10 stig |
| 5. Rókur | 8½ stig |



*Havnar Telvingarfelag, føroyameistari í liðkappingini 2008/2009. Frá vinstru Jógvan Joensen, Hjalti Toftum Jógvansson, Helgi Dam Ziska, Herluf Hansen, Bogi Ziska og Martin Poulsen*

*Mynd: Finnbjørn Vang*